# Nýggj kloakkleið í Kúrdali

**Sum nú er, rennur kloakkin í Kúrdali í Hoyvík oman eftir Kúrberingum og beint út á sjógv. Kloakkin eftirlíkar als ikki heilsukrøvini, og tí hevur Tórshavnar Kommuna nú tikið stig til at gera eina nýggja kloakkleið.**

UMHVØRVI

*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*

Heilsukrøvini siga, at ein kloakk í minsta lagi skal renna ein metur undir vatnskorpuna, men sum tað er nú, rennur kloakkin í Kúrdali oman fyri yvirflatuna á sjónum. Tað bæði sæst og luktar illa í Kúrdali av kloakkini. Tískil hevur Tórshavnar Kommuna valt at gjørt eina nýggja kloakkleið.

Nýggja kloakkleiðin hjá Tórshavnar Kommunu fer at renna gjøgnum ein tunnil, sum í næstum verður gjørdur. Tunnilin fer at verða 100 metrar til longdar, og tunnilsmunnin fer at verða átta metrar undir vatnskorpuni:

– Nýggja kloakkleiðin fer at verða sera snøgg, og eingin fer at leggja nakað til merkis. So hon verður bæði góð fyri umhvørvi og heilsuna, sigur Ronald Poulsen, verkfrøðingur hjá Tórshavnar Kommunu.

Tað verður byggifelagið, J&K Petersen, sum skal gera kloakkina við maskinum úr Norra. Tunnilin verður liðugur um sjey vikur og fer at kosta 2,5 milliónir krónur, váttar Ronald Poulsen.



*Sum nú er eftirlíkar kloakkin í Kúrdali ikki heilsukrøvini. Hon rennur beint út á sjógv, og tað bæði luktar og sæst. Á myndini síggja vit bæði núverandi kloakkina (svarta strikan) og nýggju kloakkleiðina (hvíta strikan)*



*Sum vit síggja á myndini verður tunnilsmunnin á nýggju kloakkleiðini átta metrar undir vatnskorpuni*

## Føroysk foto-/ filmsverkætlan við í svenskum festivali

MENTAN

Beint fyri páskir var upptøkuroyndin til foto-/filmsverkætlanina hjá Mariannu Mørkøre og Mariu Arnell umrødd í fjølmiðlunum. Longu nú er greitt, at úrslitið av hesi verkætlan verður at síggja í einum tí kendasta design-hotellinum í Norðurlondum, Hotel Clarion í Stokkhólmi

Hetta er í samband við altjóða fotofestivalin xpoSeptember, ið verður hildin annað hvørt ár í Stokkhólmi. Verkætlanin, sum hevur heitið Fragmented Unison, er millum tær 40 útvaldu verkætlanirnar, sum verða at síggja ymsastaðni í Stókkholmi 23.9-22.10.06.

Fyri at seta myndirnar í eitt øðrvísi listarligt høpi fara Marianna og Maria at sýna fram á hesum nýggja design-hotellinum, sum er tað størsta hotellið í Stokkhólmi. Í altjóða høpi er Hotel Clarion mest kent fyri sítt listarliga virksemi við tað, at tað keypir meiri nútíðarlist enn Moderna Museet í Stokhólmi. Hotellið umboðar í løtuni í alt 18 norðurlendsk listafólk við teimum 58 listaverkunum, sum prýða hotellið. Ein av teimum kendastu er svenski teknarin Jockum Nordstrøm.

Hotel Clarion er tað størsta handilsliga listaverkið í Svøríki, har tað longu frá byrjan av var avgjørt, at listin skuldi hava avgerandi týdning á hotellinum. Ikki bert sum prýði, men eisini í samanspæli við sjálvan arkitekturin. Hetta varð gjørt við serkønari ráðgeving innan byggilist, list og design. Bygningurin er inspireraður av heimskenda listasavninum Tate Modern í London, har rúmini eru sera høg.

Fragmented Unison er ein svørt-hvít myndarøð við 9 myndum, har tann klassiska føroyska náttúrumyndin er sett saman við fimm einsháttaðum gentum. Hetta setur ein surrealistiskan dám á myndarøðina. Myndirnar avmynda tann byrjandi ungdómin í eini óspiltari náttúru við íblástri úr sterkum grafiskum kompositiónum. Sum eitt eksperimentelt framhald av verkætlanini eru myndirnar eisini filmaðar við einum Super8 kamera.

At vera við í einum tílíkum fotofestivali er eitt sera gott høvi at vísa fram myndarøðina og sostatt fáa samband við onnur altjóða framsýningarstøð.



The Addams Family:

# Til Føroya at vitja múrin í Kirkjubø

**The Addams Family úr Írlandi kom til Føroya á vitjan í gjár. Tey komu til Føroya fyri at vitja múrin í Kirkjubø og fyri at fáa olju á bátin**

MENTAN

*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*



– Seinast vit vóru her var fyri trimum árum síðani. Tá vitjaðu vit múrin í Kirkjubø, ið bergtók okkum almikið. Og nú eru vit komin aftur til Føroya fyri at forvitnast og vita, um múrurin nú endiliga er liðugur, sigur Johan Addams, sum hevur verið á vitjan í Føroyum við stuttleikabáti sínum heili fimm ferðir:

– Vit dáma sera væl at sigla, men hetta verður tíverri seinastu ferð, vit gomlu fara ein so langan túr. Nú má verða nóg mikið við slíkum ferðum, sigur Johan Addams skemtandi við konuna.

The Addams Family verða í Føroyum í tveir dagar og fara síðan til Grønlands.